Tað kenninst næstan óverðiligt at standa her í dag, við skipsføraraprógnum í hondini. Tá ið okur byrjaðu fyri triðmum árum síðani helt man at tað varð ein long tíð at skula ganga á bonaðu skúlagólvunum og mala, heldur enn at liggja og ýla suðuri á Munkagrunninum ella aðrastaðni úti í verðini á skipsdekki.
Ofta hevur hugurin verði lítil, skúlatingini, skúladagurin og longsulin út á havið hava mest sum verði ovmikið. Men tíbetur hava okur allur hildi út og standa nú her við lønini, prógnum ið er lykilin til okkara framtíð sum navigatørar.
Eg má til stuttleikar nevna at her hava gingid trý ættalið , sum hava haft Holm til eftirnavn. Fyrst var tad abbi mín, sum gekk á tí gamla skulanum niðri við skipasmiðjuna, tað var i 1932. Síðan kom papabeiggin, pápi mín, Pætur beiggji mín og nú eg. Papabeiggji mín Alvur gekk í skúla saman vid Andru, sum er ein hin kendasti lærararin her á skúlanum í mong ár. Pápi mín er ikki heima, tí kann hann ikki vera vid til hesa hátíðarløtuna.
Síðsti skúladagur er illa nokk ferdigur, men longsulin til skúlan byrjar longu so spakuliga. Ikki kann sigast annað enn at her hevur verði gott at verði. Nógvir góður lærarar ið duga síni ting og ikki minst mamman í galluni (Kára), hon hevur sannuliga gjørt sítt til at okur hava trivist her á skúlanum. Sterka kaffi frá Káru kundi týtt uppá at hon hevur verði skipskokkur í mong ár og ikki minni hennara verðimáti. Altíð tíðindafróð og ikki minni intresserað ið hvussu tað gongur hjá tí einstaka, júst sum kokkurin umborð á skipið.
Eg vil vegna flokkin takka øllum lærarunum, teimum á skrivstovuni, bókasøluni og ikki mist kokkinum í galluni fyri at hava gjørt okkum skúlatíðina so ríka.
Tað verður hopileyst at fara at nevna allar lærarirnar her, men tveir ið nú fara upp á pensjón verða nevndur nú ið teir hava havt sín síðsta skúladag.

Vit kenna sjálvandi allir fleiri ið hava gingið á skúlanum, so man hevði hoyrt nógvar “góðar” søgur og varð spentur uppá ymiskar lærarar ikki minst Jack Sparrow, hesin hittinorði maðurin við gulloyraringinum ið altíð hevði eitt knapt og gott aftursvar.
Og lítillætna professarin úr Miðvági ið kann kritað alt pensumi upp á talvuna eftir lítlari løtu.
Og sigast má at vit eru als ikki skuffaðir av at møta legenduni Bæntsen, hann livdi sannuliga upp til rykti. Ein sera góður lærari ið kundi fáa teir tungu skúladagarnar stuttligar.
Sama varð tá ið Kristin Rasmusen fór á talvuna, men hevði ikki fingið bókina upp áðrenn talvan varð grifflað full við tølum og formlum ið vit kundi runnið skríggjandi undan við fyrsta eygnakast. Men tá ið tímin varð ferdigor, varð tað mesta av talvuni sivað inn um skallabeinið.

Eg farið at ynskja Bæntsen og Rasmusen til lukku við landsliðsplássinum og takka teimum fyri tíðina. Landsliðið hevur fingið ein góðan áloypara og ein ikki minnið góðan bakk á liðið.

Tað er við blandaðum kenslum eg standi her í dag, glaður fyri at verða ferdigor við útbúgvingina, men samstundis keddur av at skula siga farvæl við Vinnuháskúlan og ikki minst mín fantastiska flokk. Fyrst teir ið eg byrjaði saman við og síðani teir ið komið norðan úr myrkrinum at taka skipsføraran við okkum.

Tað er keðiligt at okur allor ikki kunnu verða her til próvhandanina í dag, men bæði Fríði og Alex hava corona og fáa teir tí ikki verði við.

At enda farið eg at takka øllum ið hava gjørt sítt til at eg standi her í dag, ikki minst familjuni og damuni. Eisini vil eg ynskja øllum hinum skipsførarunum, skiparinum og maskinmeistarinum hjartaligani til lukku við próvnum.

Takk fyri.
Skipsførarir 2022 Jónar Holm.